Góða Noomi Káradóttir Rasmussen,

Víst verður til telefonsamrøðu við teg tann 9. Apríl 2021 viðvíkjandi teldupostinum niðanfyri frá Uttanríkis- og Mentamálaráðnum. Nevndin í KFUK hevur viðgjørt svarið í teldupostinum í vikiskiftinum og ynskir at fáa svarið neyvari greinað av landsstýrismannninum.
Eg loyvi mær tí, teirra vegna at spyrja, um tú kanst handa landsstýrismanninum hetta skriv.

Til Jenis av Rana,
Landsstýrismaður
Uttanríkis- og Mentamálaráðið
100 Tórshavn

Góði Jenis av Rana,

Tann 14. Marts 2021 sendi KFUK skriv til Uttanríkis- og Mentamálaráðið, við umsókn um stuðul úr møguligum Hjálparpakka sum bleiv gjørdur, ella úr Hjálparpakka 3 sum møguliga bleiv settur í gidi aftur. Somuleiðis vórðu fílar við ymsum skjalatilfari viðheftir. Víst verður til henda teldupost, sum er niðanfyri dagfestur, sum nevnt, tann 14. Marts 2021.

KFUK hevur nú fingið svar í telduposti dagfest 9. Apríl 2021 frá Uttantíkis- og Mentamálaráðnum. Víst verður til nýggja lóg, sum er á veg í Løgtingið – tykkara mál nr. 21/03208 og LM-139/2020 har sagt verður, at KFUK er ikki fevnt av nýggju lógini.

Við at lesa lógaruppskotið, er lógin greitt stílað til listafólk um stuðul í sambandi við COVID-19. Annað lógaruppskot LM-140/2020 er eisini komið til Løgtingið frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum um stuðul til ferðavinnufyritøkur. Sambært § 1, stk. 4 nr. 3, eru feløg, grunnar o.a. við almannagagnligum ella vælgerandi endamáli, ikki fevnt av tí løgtingslógaruppskotinum. KFUK hevði mett seg at koma undir slíka áseting í einum nýggjum hjálparpakka.

KFUK hevur einki ímóti at Listin ella ferðavinnan fær møguligan tiltrongdan stuðul. Hinvegin harmar tað okkum, at umsókn okkara um stuðul úr Hjálparpakka, ikki verður mett at hava tílíkan týdning sum Listin og ferðavinnan hevur, og tí ikki verður tikin við í lógaruppskotinum.

Vit kunnu upplýsa, at KFUM fekk úr Hjálparpakka 3, tí teirra tiltak og umsókn lá innanfyri tíðarskeiðið, tá lógin fór úr gildi.

KFUK loyvir sær virðiliga enn einaferð at biðja um:

1) At verða umfatað av lógaruppskotinum, sum UMMR hevur sent løgtinginum, og um ikki so kann verða,
2) At fáa grundaða frágreiðing fyri, hví stuðul til neyðugan rakstur av KFUK, ikki kann fáast úr hesum ella øðrum hjálparpakka.

Við vón um, at UMMR vil endurskoða/eftirmeta uppskotið við atliti til, at veita KFUK neyðuga stuðulin, takka vit fyri at fáa hetta høvið at bera søk okkara inn til tygara.

Vinarliga

KFUK

v. Bjartur Dalsgarð, løgfrøðingur

Fra: Mentamálaráðið [mailto:ummr@ummr.fo]
Sendt: 9. april 2021 13:18
Til: Bjartur Dalsgarð <bjartur@mail.fo>
Emne: SV: Viðv. Umsókn um stuðul úr Hjálparpakka sum møguliga verður gjørdur afturat, ella um Hjálparpakki 3 verður settur í gildi aftur

Góði Bjartur Dalsgarð

Hjálparpakki 3 verður ikki settur í gildið aftur.

Ístaðin er nýggj lóg á veg í Løgtingið sum veitir hjálp til listafólk undir covid19.

KFUK er ikki fevnt av nýggju lógini.

Uttanríkis- og mentamáláðið ger ikki meira við umsókn tygara.

Vinarliga / Kind regards

Noomi Káradóttir Rasmussen
Samskipari

Office: +298 306500
Mobile: +298 555024
noomir@ummr.fo

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FOREIGN AFFAIRS AND CULTURE
Tinghúsvegur 5-7 / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 306500 / ummr@ummr.fo / www.ummr.fo

Fra: Bjartur Dalsgarð <bjartur@mail.fo>
Sendt: 14. marts 2021 22:01
Til: Mentamálaráðið <ummr@ummr.fo>
Cc: Oystein Sørensen <OysteinS@ummr.fo>; 'Bjartur Dalsgarð' <bjartur@mail.fo>
Emne: Viðv. Umsókn um stuðul úr Hjálparpakka sum møguliga verður gjørdur afturat, ella um Hjálparpakki 3 verður settur í gildi aftur
Prioritet: Høj

Til Uttanríkis – og Mentamálaráðið

Felagsskapurin KFUK loyvir sær við hesum at søkja um stuðul úr Hjálparpakka, sum møguliga verður gjørdur afturat, ella um Hjálparpakki 3 verður settur í gildi aftur.

KFUK søkti úr Hjálparpakka 3 í 2020, men umsøknin varð ikki gingin á møti, tí eydnuhjól sum skuldi haldast í november 2020 fall uttanfyri dagfestingina, tá Hjálparpakkin fór úr gildi tann 31. August 2020.

Nú KVF hevur havt samband við UMMR um stuðul til Ítrótt og Mentan fyri mista inntøku av Covir-19, sum liggur eftir 31. August 2020 og fram til 31. Desember 2020, vil KFUK nýta sama møguleika at søkja um stuðul, tí inntøkan av eydnuhjóli og lutaseðlaølu er ein týðandi partur av rakstrinum av virkseminum hjá KFUK, sum ger eitt munandi alment gagnligt arbeiði fyri miðal aldrandi og eldri persónar.

Í viðfestu fílum sæst umsókn frá KFUK í 2020, samskifti við UMMR og TAKS og noktandi svar frá TAKS um stuðul, uppgerðir fyri eydnuhjól árini 2018 og 2019 og endaliga nýggj umsókn dagfest 13. Mars 2021, undirskrivað av stjórn og skrivara í KFUK.

Vinarliga

KFUK